# 2008



ein rúgva av mentanarligum og handilsligum tilboðum til borgararnar – bæði frá privatum fyritøkum og almennum stovnum.

Sum nakað nýtt fortelur Ingigerð, at stovnarnir á Debesartrøð, Vinnuháskúlin, Læraraskúlin og Altjóða Skrivstovan skipa fyri kunnandi tiltøkum mentanarnáttina.

Harumframt verður helst onkur framførsla í Hansens Pakkhúsi, sum nýumvælda reinsaríið í Tórsgøtu verður rópt. Hetta er tó ikki komið heilt undir land enn.

Annars upplýsir Ingigerð á Trøðni, at allir handlarnir í miðbýnum og í SMS hava opið til kl. 23 og Keypsamtøkan til kl. 21. Annars eru øll tiltøkini ókeypis, um ikki annað er viðmerkt.

## Skiftast um

Ingigerð greiðir frá, at mentanarná±ttin verður sett í Gamla Kommunskúlagarði fríggjakvøldið kl. 18. Har flytur Heðin Mortensen, borgarstjóri, fram røðu og GHM spælir. Ingigerð fortelur, at Havnar Hornorkestur og GHM skiftast um at spæla annaðhvørt ár. Og annaðhvørt ár setir ein kvinna tiltakið, og annaðhvørt ár er tað eitt mannfólk.

## Børn og ung

10–20 Føroya Fornminnissavn og Útisavnið, Heima á Garði í Hoyvík, verða sýnd fram. Á útisavninum kanst tú vitja ein gamlan føroyskan garð við sethúsum og mongum øðrum.

10–22 Føroya Náttúrugripasavn, V.U. Hammershaimbs gøta. Framsýningin føroyskt djóra- og plantulív og føroysk jarðfrøði. Í urtagarðurin eru umleið 150 føroysk plantusløg.

17–21 Stórt barnatiltak hjá barnatannrøktini við ymiskum undirhaldi í Grasagarði. Har verða Kariussar og Baktussar og tenn bæði inni og úti, fiskibrunnur. Barnakór hjá Musikkskúlanum syngur kl. 17. Stóru talvfólkini verða eisini sett upp.

18 Sjónleikarhúsið. Næmingar í elstu bólki í skúlanum í Havnar Sjónleikarfelag hava opna venjing. Eitt improviserað brot úr leikinum "Haroun og Søgunnar Hav" eftir Salman Rushdie. Spælt verður millum Sjónleikarhúsið og Hans Andriasar hús.

18–23 Bursatangi. Tórshavnar Sløkkilið hevur framsýning av brandbilum og eldsløkking.

18–22 Opið skip og framsýning umborð á M/S Thorshavn. Stuttur sightseeing túrur útum Havnina kl. 19 og 21. Tekning umborð.

19-23 Westward Ho, Lága kei, hevur opið skip

19 og 20 Miðbýurin. Fimleikarar úr Ljósinum framføra á airtrack. Millum sýningarnar sleppa børn eisini at royna seg á airtrack. Fimleikafelagið hevur eisini sølubás.

20–01 Margarinfabrikkin, Tórsgøta, opið. Konsert verður kl. 21:3



## Handilstiltøk

- 23 Diva og Frú C hava uttandura torg við tilboðsvørum, kaffi og vaflum í Dr. Jakobsens gøtu.

20-23 Við Havnará, Beinta Vilhelmsen, skraddari, hevur opið. Kl. 20 spælir Jens Marni uttanfyri handilin við Havnará.

- 23 Handil og Kaffi. Handilin er opin.



## Tónleikur

17 Barnakór hjá Musikkskúlanum syngur í Grasagarði

18:30 Snarskivan. Martin Joensen syngur og spælir í sambandi við, at listaframsýning hjá Astrid Andreasen letur upp.

19-21 Miðlahúsið, konsertir. Kl. 19 Kvonn (folk), og kl. 20 Yggdrasil spælir Ravnating (jazz/world). Kostnaður 100 kr.

19:30 Tórshavnar Kamarkór syngur í Amtmansgarðinum.

20 Tórshavnar Klarinett-orkestur spælir í Havnar Kirkju.

20 Jens Marni spælir uttanfyri handilin hjá Beintu Vilhelmsen við Havnará.

21-22 Felagssangur við Simma Jacobsen og Fróða Sandoy í Tilhaldinum.

21 Tinghúsgarðurin. Havnar Hornorkestur hevur uttandura konsert

21 Ebenezer opið hús við sangløtu við Sangkórinum, Ungdómskórinum, Manskorinum og øðrum.

21:30 Margarinfabrikkin, Tórsgøta, konsert

22:30 Gamli Kommunuskúlagarður. Kvinnukór syngur a capella.

## Framsýningar

10–20 Føroya Fornminnissavn og Útisavnið, Heima á Garði í Hoyvík, verða sýnd fram. Á útisavninum kanst tú vitja ein gamlan føroyskan garð við sethúsum og mongum øðrum.

10–22 Føroya Náttúrugripasavn, V.U. Hammershaimbs gøta. Framsýningin føroyskt djóra- og plantulív og føroysk jarðfrøði. Í urtagarðurin eru umleið 150 føroysk plantusløg.

19–22 Realskúlin. Framsýning við barnatekningum úr realskúlanum í 50-unum teknaðar hjá J.M. Kjeld . Heðin Mortensen og Johan Kjeld opna framsýningina, sum Jórunn Dánialsdóttir skipar fyri.



## Urtagarðar

17–23 Bojsensgarður aftanfyri H.N Jacobsens Bókahandil er opin

18–22 Ríkisumboðið – Amtmansgarðurin er opin. Tórshavnar Kamarkór syngur kl. 19.30.